Áki Olsen á Bliki:

## Misnøgdur við endaspurtin

16 ára gamli Áki Olsen, sum rør við Bliki, var vælnøgdur aftaná róðurin.

–Vit vunnu, so tað var ikki so galið. Men eg eri alíkavæl ikki ordiliga nøgdur við endaspurtin. Vit vóru for slappir í spurtinum, og Havfrúgvin kom langt inn á okkum tá. Men annars gekk tað væl í dag. Vit hava vunnið alt uttan Norðoyastevnuna, so tað er bara gott, sigur hann.

Áki róði í fjør eisini, og honum dámar stak væl kappróðurin. – Tað er ræðuliga hart, og tað er feitt. Aðrar ítróttagreinar eru ov lættar, tá man hevur roynt at rógva, haldi eg.

# Torført at taka Blik

Við teirra fjórða sigri á rað hevur Blikur av Argjum av sonnum lagt kós móti føroyameistaraheitinum. Og hóast kappingin er hørð millum manningarnar, so letur tað til at vera serstakliga torført hjá hinum manningunum at taka Blik. Hann er í øllum førum endaður fremstur fýra teir seinastu róðrarnar.

Róðurin á Fjarðastevnu var annars rættuliga spennandi, tí bæði Spógvin og Havfrúgvin góvu Bliki ein skarpan gang.

Spógvin, sum ikki hevur vunnið síðani á Norðoyastevnu, var fremstur ein part av málinum, men argjadreingir komu aftur, tá málið var hálvrógvið.

Spenningurin var varðveittur gjøgnum allan róðurin, og svaraðu manningarnar væl aftur til hvørja aðra, tá hinar spentu meira í.



*Hóast roynt verður av øllum alvi, so letur tað til at vera serstakliga torført at taka Blik av Argjum, sum nú hevur vunnið fýra stevnur á rað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hóast Spógvin gjørdi ein vørr í endaspurtinum, var tað ov seint, og máttu teir tí taka til takka við einum øðrum plássi enn einaferð. Føroyameistarakappingin hjá fimm mannaførunum er nærum avgjørd, tí Blikur liggur langt fremst. Hetta er ein av teimum kappingunum, har spenningurin um meistaraskapin er farin. Men eftir stendur framvegis spenningurin um teir báðar komandi róðrarnar, sum eru eftir, áðrenn kappingarárið 2004 er av.

**- sae -**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 05.40.01 |
| 2 | Havfrúgvin | 05.41.05 |
| 3 | Spógvin | 05.42.09 |
| 4 | Tekla | 05.45.06 |
| 5 | Fípan Fagra | 05.46.03 |
| 6 | Firvaldur | 05.47.21 |
| 7 | Tjaldrið | 05.55.14 1G |
| 8 | Kollur | 05.55.16 |
| 9 | Svanur | 05.56.03 |
| 10 | Royndin Fríða | 05.58.12 |
| 11 | Sílið | 06.04.18 |
| 12 | Drekin | 06.12.00 |

# Ein sannur gysari

Genturóðurin á Fjarðastevnu var sera spennandi og tættur. Fýra bátar komu á mál innan fyri eitt sekund, og sigur tað alt.

Havfrúgvin fekk besta startin á heimasjógvi, men hinir bátarnir lógu har allatíðina og lúrdu kortini. Tað hava annars verið Blikur og Sílið, sum hava vunnið undanfarnu fýra róðrarnar, men í byrjanini í Vestmanna vildu vertirnir tað øðrvísi.

Tá startspurturin var av, lat til at Sílið úr Havn var við at koma seg. Báturin við drekastevninum legði seg á odda, og Blikur helt seg somuleiðis framat.

Hesir tríggir bátarnir lógu stavn um stavn so at siga allan róðurin til miklan spenning fyri áskoðarar eins væl og rógvarar. Tað er undirhaldandi at síggja slíkar róðrar, tí teir bera boð um, at støðið hækkar fyri hvørja stevnu, og tað er bara at fegnast um.

Tá endaspurturin byrjaði hildu tey flestu, at nú mundi onkur bátur fara at ríva seg leysan. Men so var ikki. Heldur løgdust teir aftaru afturat. Har kom millum aðrir Junkarin í Kvívík við einum knasandi góðum endaspurti, og Junkarin endaði á einum deildum øðrum plássi við Blik.

Ein fantastiska flott og vøkur sjón at síggja tríggjar ella fýra bátar koma nærum javnir um málstrikuna.

Rópið úr málbilinum hoyrdist ikki, tí trý skot brustu nærum samstundis. Øll sum stóðu har rundanum, høvdu á tungu, at har var tætt, og at tað fór at ganga ein løta, áðrenn endaliga úrslitið var klárt. Og so varð. Bíðað varð, meðan hugt var eftir á videoupptøkuni. Tað var javnt. Sílið vann tætta róðurin, og tveir bátar vórðu nummar tvey. Fjórði báturin kom um málstrikuna í sama sekundið sum hinir tríggir, so her var veruliga talan um ein gysara.

**- sae -**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 05.56.18 |
| 2 | Blikur | 05.56.21 |
| 2 | Junkarin | 05.56.21 |
| 4 | Havfrúgvin | 05.56.23 |
| 5 | Frúgvin | 05.58.00 |
| 6 | Firvaldur | 05.58.05 1G |
| 7 | Drekin | 06.02.16 |
| 8 | Fípan Fagra | 06.05.06 |
| 9 | Ørnin | 06:06.04 |
| 10 | Falkur | 06.17.07 |
| 11 | Tjaldrið | 06.18.00 |
| 12 | Spógvin | 06.19.07 |
| 13 | Tekla | 06.31.13 |
| 14 | Dúgvan | 06.31.24 |

## Suverenan endaspurt

Sigrun Helga, Elna og Anja á Junkaranum vóru sera væl nøgdar við teirra róður. Tær høvdu ein sera góðan endaspurt, sum tók tær fram á eitt deilt 2. pláss við Blik.

– Vit eru væl nøgdar, tí vit høvdu ein alvorliga góðan endaspurt. Vit høvdu ein ringan start, men komu so við í miðróðrinum. Og í endaspurtinum tóku vit nógvar bátar, siga tær. Elna, sum er róðurskvinna sigur, at hon ikki visti hvat nummar tær vóru. – Eg sá, at vit vóru væl við, men tað var eitt ivamál, hvat nummar vit lógu. Tað var tætt, og vit ánaðu ikki, hvussu tað hevði gingist tá vit komu



inn um linjuna. Vit vistu alíkavæl, at vit vóru ímillum fimm teir fremstu bátarnar. Men so kom formaðurin út við maskinbáti, og segði okkum, at vit vóru blivnar nr 2, saman við Bliki. Vit vóru ræðuliga glaðar!

Tær flestu á Junkaranum hava róð í fleiri ár, tó er ein, sum ongantíð hevur róð áður.

**- eys -**



*Orð eru nærum óneyðug til hesa røðina. Fýra bátar stevna púra javnir inn móti málinum*

*Myndir: Álvur Haraldsen*



Súsanna og Eivy á Jarnbardi:

# Vit komu aftur!



*Helst allaryngsti jarnbardafjepparin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Súsanna og Eivy á Jarnbardi vóru væl nøgdar eftir róðurin á fjarðastevnuni, hóast tað ikki hevði gingið akkurát eftir ætlan.

– Vit lógu nr. 2 eina løtu, og tað var ikki ætlanin. Men vit vístu, at vit knekka ikki, hóast vit fara afturum. Vit vinda okkum uppaftur, og svara aftur, siga tær.

– Vit hava góða venjing og sera gott samanhald. Og tá tað gongur væl á stevnunum er tað ein góð motivatión til at halda á. Vit halda ikki at tað er keðiligt, at kappingin er so lítil. Vit vilja vinna, og tað hava vit gjørt higartil. Og fyri hvønn róður vit vinna, vilja vit bara vinna meir.

Tær halda báðar, at tað besta við kappróðrinum er samanhaldið í bátinum. Og so sjálvsagt tað, at vinna. – Tað er tí vit eru við, tí vit vilja vinna. Vit vilja rógva betur og betur, og vinna meir og meir, siga tær. Enn vita tær ikki um tær ætla sær at rógva aftur í næsta ár.

**eys**



# Lómur vísti vilja

Kappingin hjá 6-mannaførum við kvinnum hevur higartil ikki verið serliga spennandi. Jarnbardur tykist vera ógjørligur hjá hinum bátunum at taka, og leygardagin vunnu tær aftur. Hesuferð var kappingin frá hinum bátunum tó harðari enn vant. Undir miðróðrinum vann Páll Fangi, sum er nr 2 í FM-kappingini, seg nevniliga fram um Jarnbard, og var eina løtu oddabátur. Hetta var tó stokkut gleði, tí løtu seinni tóku Jarnbardakvinnurnar sær um reiggj, og vunnu seg framaftur. Páll Fangi og Gongurólvur tyktust verða teir bátarnir, sum fóru at fáa ávikavist silvur og bronsu. Nakað áðrenn endaspurtin loysti Jarnbardur frá hinum bátunum, og so mundu tey flestu halda, at tær aftur fóru at vinna í stórum stíli. Men Lóma kvinnurnar vildu tað øðrvísi. Nakað væl inni í miðróðrinum byrjaði Lómur at ganga væl, og tær blandaðu seg skjótt upp í kappingina. Beint áðrenn endaspurtin tóku tær bæði Gongurólv og Páll Fanga, og við einum øgiligum spurti vunnu tær seg enntá inn á Jarnbard. Hetta var tó ikki nóg mikið til at taka bláa bátin, men tey fimm stigini munnu óiva koma væl við hjá Lómakvinnunum, sum hingu fastar í startinum á Jóansøku, og tá ikki megnaðu meiri enn eitt fimta pláss. Við hesum hava tær víst, at tær enn kunnu vera við í kappingini, og nú eru bert 5 stig upp til næstbesta bátin, sum er Páll Fangi. So hóast sannlíkt er, at Jarnbardur verður meistari á komandi stevnu, so er enn kapping um silvurkrónurnar.

**Eys**



*Hóast hóttar eina løtu, megnaðu jarnbardakvinnurnar aftur hesaferð at vinna sannførandi*

*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Lómur megnaði við einum øgiligum spurti at taka bæði Gongurólv og Páll Fanga, og at vinna seg inn á Jarnbard, sum í miðróðrinum hevði loyst frá hinum bátunum*

*Myndir: Álvur Haraldsen*